

# Statoil fyrireikar nýggjar milliardasparingar

**Jan Müller**

05.06.2014 - 15:03

Oljan.fo

Tað er tíðindatænastan Bloomberg News, sum veit at siga, at leiðslan í norska oljufelagnum við Helge Lund, forstjóra (myndin) á odda hevur ætlanir um at spara, og at tað skal millum annað gerast við at minka starvsfólkatalið.

Samskiftisstjórin hjá Statoil, Jannik Lindbæk jr., er ikki serliga tíðindafróður, tá hann verður spurdur um sparingarnar.

-Vit gera ikki viðmerkingar til innanhýsis arbeiðsskjøl viðvíkjandi okkara ætlanum um effektiviseringar, sigur hann við Bloomberg News.

Sambært tíðindatænastuni skal Statoil milum annað spara 25 prosent av útreiðslunum til

nýggjar útbyggingar innan 2020. Hetta og aðrar sparingar skulu gera, at 20 prosent av teirri "teknisku" arbeiðsmegini verður skarvað burtur, skrivar Bloomberg News.